Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	16.01.2026
Mál nr.:	25/08929
Málsviðgjørt:	EK/ST
Ummælisfreist:	27.11.2025/05.01.2025
Eftirkannað:	20.01.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt
(Býtið millum land og kommunu, tilboð og aldursbólkar, námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005, løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 og løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

"**(Dagstovnalógin)**"

2. § 2, stk. 2 verður strikað.

3. § 2 a og yvirskriftin yvir § 2 a verða strikaðar.

4. § 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3.** Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og hevur ábyrgdina av virkseminum.

Stk. 2. Dagstovnar sambært hesi løgtingslóg eru hesi námsfrøðiligu tilboð:

1) Vøggustovur til børn í aldrinum 10 mánaðir til 3 ár.
2) Barnagarðar til børn í aldrinum 3 ár til byrjan av skúlagongd.
3) Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.
4) Dagrøkt er tilboð í heimi hjá dagrøktara ella í spælistovu. Dagrøkt kann skipast sum partur av samansettum tilboði sambært stk. 4.

Stk. 3. Kommunan kann í serligum føri gera frávik í omanfyri standandi aldursbýti.

Stk. 4. Kommunan kann sambært hesi løgtingslóg skipa samansett tilboð til børn í aldrinum 10 mánaðir til og við 2. flokk."

5. Aftan á § 3 verður sett:

"**§ 3 a.** Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, hava opið

gerandisdagar í dagtímunum. Frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum. Kommunan ásetur nærri upplatingartíðir fyri dagstovnar.
Stk. 2. Kommunan kann uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 áseta, at dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, heilt ella partvíst ikki hava opið ávísar dagar og í skúlafrítíðum, tó í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur. Kommunan kann samskipa tilboð í skúlafrítíðum.

Námsfrøðilig ábyrgd, samstarv og samskipan

§ 3 b. Kommunurnar hava dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av dagstovnaøkinum.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri námsfrøðiliga virkseminum.

§ 3 c. Landsstýrisfólkið og kommunurnar skipa eina Samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið við tí endamáli at fremja felags fakliga menning, samskipan og ráðgeving á lands og kommunalum stigi.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið setur eitt fakligt Dagstovnaráð at ráðgeva Samstarvsnevndini.

Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um skipan, manning og virksemi fyri Samstarvsnevndina sambært stk. 1 og Dagstovnaráðið sambært stk. 2."

6. Aftan á § 5, men áðrenn yvirskriftina yvir § 6, verður sett:

"*Námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving*

§ 5 a. Kommunan skal tryggja, at øll dagstovnatilboð í kommununi hava atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum.
Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, undir hesum reglur um upplýsingargongd, samstarv og ábyrgdarbýti."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógin um dagstovnar og dagrøkt er frá 2000. Síðani tá er samfelagið broytt nógv - bæði familjulív, arbeiðslív og faklig krøv til dagstovnar eru heilt onnur í dag. Foreldur hava aðrar tørvir og væntanir, og fakliga vitanin innan námsfrøði og menning er ment nógv. Land og kommunur eru á einum máli um, at tørvur er á at endurskoða og dagføra dagstovnalógina, so hon hóskar til okkara tíð og veruleika.

Í verandi lóg eru fleiri viðurskifti ógreið. Tað er t.d. ikki nóg greitt, hvussu ábyrgdin verður býtt millum land og kommunur, og tað mangla felags fakligir karmar og greiðar reglur um ráðgeving. Ymiskir fakligir og skipanarligir leistir hjá kommununum hava gjørt, at skipanin í dag er ólík frá stað til stað. Hetta kann í ávísum førum elva til, at børn og foreldur uppliva tænastur og atgongd til stuðul ymiskt. Nakrar kommunur hava egna námsfrøðiliga ráðgeving, meðan aðrar keypa tænastu uttanífrá, og hetta hevur ført til ymiskan struktur og tilgongd. Ein felags karmur kann tí styrkja gjøgnumskygni og tryggja meira javnbjóðis atgongd til fakligan stuðul og ráðgeving um landið.

Eitt dømi um ógreið viðurskifti í verandi skipan er, at lógin frá 2000 sigur, at dagstovnar fevna um vøggustovu, barnagarð, dagrøkt og frítíðarheim, samstundis sum viðmerkingarnar til lógina staðfesta, at lógin ikki fevnir um frítíðarklubbar og frítíðarvirksemi. Í 2006 varð tó kunngerð lýst, sum staðfesti, at frítíðarheim kunnu vera fyri børn frá 7 til 18 ár. Hetta hevur skapt ósamsvar og ógreið mørk millum tey námsfrøðiligu tilboðini, sum dagstovnalógin fevnir um, og tey sosial-námsfrøðiligu frítíðartilboðini til eldri børn og ung, sum hava annað endamál, starvsfólkasamanseting og fígging. Úrslitið er, at kommunurnar kunnu síggja hetta ymiskt, og harvið kunnu familjur fáa ymiska upplýsing og ymisk tilboð alt eftir bústaði.

Løgtingsins umboðsmaður hevur í eini ávísari klagumálsviðgerð lagt aðra tulking til grund fyri reglunum um upplatingar- og afturlatingartíðir enn hana, sum var nýtt í fyrisitingini. Hetta málið hevur víst á, at tørvur er á at dagføra og greiðari staðfesta reglurnar á økinum. Arbeiðið við lógarbroytingini tekur støði í samgonguskjalinum hjá núverandi samgongu. Eitt av málunum er at dagføra dagstovnalógina og styrkja bæði námsfrøðiliga dygd og javnbjóðis tænastur á økinum.

Tí verður í arbeiðinum við at dagføra dagstovnalógina serliga hugt at trimum høvuðsspurningum:

1. Hvussu skal ábyrgdin millum land og kommunur skipast?
2. Hvørji tilboð og hvørjar aldursbólkar skal lógin fevna um?
3. Hvussu skal námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skipast?

Við at taka hesar spurningar fram fyrst, verður tryggjað, at lógin byggir á eitt støðugt og fakligt grundarlag, sum kann mennast og laga seg til framtíðar tørv.

Endamálið við lógarbroytingini er at skapa eina greiða og nútíðarhóskandi skipan, har land og kommunur hava greiðar leiklutir, og har øll børn fáa somu góðu møguleikar, óheft av bústaði.

Kommunurnar skulu hava dagliga ábyrgd av rakstri, fígging og námsfrøðiliga innihaldinum, meðan landið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og setur felags faklig stevnumið og

karmar. Samstundis verður samstarv millum land og kommunur styrkt við eini felags nevnd, sum skal tryggja fakligan samanhang og menning á økinum.

Eitt serligt eyðkenni við føroyska dagstovnaøkinum er, at stovnarnir hava verið tilvitaðir um staðbundnar umstøður og mentanarlig viðurskifti. Hetta hevur verið ein styrki, tí dagstovnarnir hava megnað at tillaga seg til tørv og livihátt í lokalum samfeløgum kring landið.
Samstundis er tørvur á, at vit sum land seta eina felags námsfrøðiliga stevnu, sum greiðir frá, hvat eitt dygdargott dagstovnatilboð eigur at umfata. Við trivnaðinum og menningini hjá barninum sum høvuðsmál, skal felags stevnumið tryggja, at øll børn í Føroyum fáa somu fakligu møguleikar.

Tørvur er eisini á greiðum reglum um, nær dagstovnar kunnu hava stongt, og hvussu foreldur fáa kunning um hetta, so rættindi og skyldur verða eins um alt landið.

Eisini verður lógarfest skipan fyri námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving, har kommunurnar tryggja atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving, einsamallar ella saman við øðrum kommunum, meðan landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan. Hetta tryggjar greitt fakligt ábyrgdarbýti og javnbjóðis tænastur fyri øll børn.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi dagstovnalóg, løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000, hevur til endamáls at tryggja børnum umsorgan, menning og kristna og siðalagsliga uppaling í einum tryggum og góðum umhvørvi.
Kommunurnar hava ábyrgdina av dagliga rakstrinum og fyrisitingini, meðan landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært § 2, stk. 2.

Lógin fevnir um dagrøkt, vøggustovur, barnagarðar og frítíðarheim, men fevnir ikki um frítíðarklubbar ella onnur frítíðar- og ungdómstilboð, sum annars eru vanlig í kommununum. Lógin ger heldur ikki greitt, hvussu aldursmørk og innihald í frítíðarheimunum skulu skiljast í mun til onnur tilboð til eldri børn og ung.

Ráðgeving og eftirmeting eru ikki skipað á eins hátt í landinum, og stórur munur er á, hvussu kommunurnar loysa hesar uppgávur.

Sambært § 3 í galdandi lóg hava kommunurnar ábyrgdina av at veita dagstovnapláss og reka virksemið. Dagstovnar og dagrøktir hava vanliga opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunurnar kunnu eisini bjóða víðkaðar upplatingartíðir – til dømis um kvøldið, um vikuskiftið ella sum samdøgursansing – sambært galdandi heimildum.

Kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006 staðfestir nærri reglur um býti og aldursbólkar á dagstovnum og dagrøktum:

- Vøggustova: uml. 5-36 mánaðir,
- Barnagarður: 3-7 ár,
- Útibarnagarður: 4-7 ár,
- Frítíðarheim: uml. 6-18 ár,
- Samansjóðaður stovnur: uml. 5 mánaðir – 7 ár,
- Dagrøkt: ansing í heimi hjá dagrøktara ella í spælistovu, í mesta lagi fimm børn.

Í verandi lóggávu er ikki greitt, hvørt og í hvønn mun dagstovnalógin fevnir um ungdómstilboð til børn og ung frá 3. flokki til 18 ár.

Serligu viðmerkingarnar til lógina frá 2000 vísa á, at dagstovnalógin ikki fevnir um frítíðarklubbar og frítíðarvirksemi, tí tey hava eitt annað endamál og øðrvísi faklig krøv enn dagstovnar og dagrøkt.
Kortini ásetur kunngerð nr. 32 frá 4. mai 2006, at frítíðarheim kunnu fevna um børn og ung frá 7 til 18 ár.

Hetta skapar ógreið mørk millum:
- frítíðarheim undir dagstovnalógini og
- frítíðarklubbar/ungdómshús, sum dagstovnlógin ikki fevnir um..

I praksis hava frítíðarheim í hesum breiða aldursbólki (7–18 ár) sera ymisk innihald, fakligar treytir og aldursbýti, og endamálið er ofta meira sosialt og mentanarligt, enn tað námsfrøðiliga grundarlagið, sum dagstovnaøkið byggir á.

Í 2018 varð áseting sett inn í dagstovnalógina at seta Dagstovnaráð. Dagstovnaráðið varð sett á stovn fyri at styrkja samstarvið millum land og kommunur og at veita felags fakliga ráðgeving á dagstovnaøkinum. Gongdin hevur tó víst, at tað hevur verið trupult hjá ráðnum at røkka hesum endamálinum við verandi samanseting og uppgávubygnaði, og tørvur er tí á at endurskoða, hvussu ein slík felags skipan kann virka betur frameftir.

Sambært § 5 í dagstovnalógini hava børn við serligum tørvi rætt til dagstovnapláss og námsfrøðiligt tilboð á jøvnum føti við onnur. Kommunan hevur dagligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina.

Fleiri kommunur hava sett námsfrøðiligar ráðgevar sambært § 5, men skipanin er ójavnt bygd upp, og eingin felags karmur er í lógini.
Lógin ásetur heldur ikki beinleiðis, at kommunurnar skulu hava námsfrøðiliga ráðgevingarskipan.

Sernám hevur í fleiri ár veitt sernámsfrøðiliga ráðgeving og stuðul til dagstovnar og kommunur. Virksemið hevur verið fjølbroytt og fevnt um bæði ráðgeving, vegleiðing og aðrar sernámsfrøðiligar uppgávur, sum í praksis hava verið skipaðar í samspæli við kommunur og stovnar.

Henda skipanin hevur tó ikki havt greiða og beinleiðis heimild í dagstovnalógini, men er grundað á aðrar lógarheimildir og praktiskar loysnir. Hetta hevur gjørt uppgávubýtið millum kommunala og landsbundna ábyrgd ógreitt, bæði fyrisitingarliga og fakliga.

Tørvur er á at fáa greiðar heimildir og ábyrgdarbýti fyri sernámsfrøðiliga ráðgeving í dagstovnalógina. Hetta samsvarar eisini við vanligu skipanina millum land og kommunur, har uppgávur, ið krevja serligan serkunnleika og miðsavnaðar fakligar loysnir, verða loystar á landsstigi, meðan kommunurnar reka tiltøk, ið kunnu gerast í lokal umhvørvinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógarbroytingini er at styrkja teir námsfrøðiligu og fakligu karmarnar um føroyska dagstovnaøkið og at tryggja, at øll børn í Føroyum hava javnbjóðis møguleikar fyri

menning, trivnaði og sosialum felagsskapi. Lógin skal skapa eitt greiðari rættargrundarlag, har ábyrgdarbýtið millum land og kommunur er týðiligt, og har samstarvið millum dagstovnar og skúlar verður betur samskipað.

Sambært yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdini skal landsstýrisfólkið tryggja felags fakligt grundarlag og samskipan á dagstovnaøkinum. Henda uppgávan skal útinnast umvegis ein landsmyndugleika við fakligum førleika á økinum. Nám fær sum uppgávu at menna, samskipa og miðla felags námsfrøðilig stevnumið, leiðreglur og dygdaramboð til kommunur og stovnar, umframt at stuðla kommununum í menningar- og eftirmetingararbeiði.

Dagstovnur er í dag ein týðandi partur av lívinum hjá teimum flestu børnunum í Føroyum. Foreldur eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, og dagstovnarnir hava ein lyklaleiklut at tryggja góðan og tryggan gerandisdag, menning, spæl og sosialar førleikar hjá barninum. Tí hevur dygdin í námsfrøðiliga arbeiðinum beinleiðis ávirkan á trivnað og javnrætt bæði hjá einstaka barninum og í samfelagnum sum heild.

Uppskotið tekur støði í trimum kjarnuspurningum, sum eru grundleggjandi fyri eina vælskipaða og framtíðarrættaða dagstovnalóg:

1. hvussu ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skal skipast,
2. hvørji tilboð, og hvørjar aldursbólkar lógin skal fevna um, og
3. hvussu námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skal skipast.

Við at loysa hesi viðurskifti verður stovnað eitt felags og støðugt fakligt grundarlag, sum bæði tryggjar javnbjóðis tænastustig og gevur rúm fyri, at kommunur og stovnar framvegis kunnu tillaga tilboðið eftir staðbundnum umstøðum, sum er ein av styrkini í føroyska dagstovnaøkinum.

Eitt av endamálunum við uppskotinum er at greiða og avmarka, hvørji tilboð dagstovnalógin skal fevna um.

Uppskotið ger greitt, at dagstovnalógin fevnir einans um frítíðarstovnar fyri børn í forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk, har dentur verður lagdur á námsfrøðiligt innihald, tryggar fakligar karmar og trivnað hjá barninum eftir skúladag.

Tilboð til eldri børn og ung – frá 3. flokki og uppeftir – verða hinvegin skilmarkað sum frítíðarklubbar og ungdómshús, sum hava eitt annað endamál, eitt annað fakligt grundarlag og skulu skipast undir øðrum lógar- og fíggjarkarmum enn dagstovnar. Henda avmarking tryggjar greið rættarviðurskifti, javnbjóðis tilboð og fakliga røttu skipanina fyri hvønn aldursbólk.

Eitt annað endamál við uppskotinum er at staðfesta og styrkja ábyrgdarbýtið millum land og kommunur.
Kommunurnar fáa greiða ábyrgd av dagstovnaøkinum – námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga – meðan landið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri dagstovnaøkið.

Við uppskotinum verður eisini sett á stovn ein Samstarvsnevnd, har land og kommunur regluliga samstarva um fakliga menning, dygd og samskipan. Hetta skal tryggja varandi samstarv og felags stevnu fyri økið.

Harumframt verður skipað eitt fakligt Dagstovnaráð, sum skal ráðgeva Samstarvsnevndini og tryggja, at arbeiðið í nevndini byggir á eitt breitt og skipað fakligt grundarlag.

Uppskotið ger eitt grundstig av námsfrøðiligari ráðgeving lógarbundið. Kommunurnar skulu tryggja dagstovnum atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving – einsamallar ella í samstarvi við aðrar kommunur – fyri at styrkja stovnarnar í dagliga arbeiðinum, fakligum avbjóðingum og í arbeiðinum at lofta børnum tíðliga.

Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, tá tørvur er á serligum fakligum førleika. Hetta merkir, at kommunurnar fyrst arbeiða við námsfrøðiligu tiltøkunum og leita til landsins serkunnleika, tá avbjóðingarnar eru tvørfakliga samansettar og fara út um námsfrøðiligu karmarnar.
Fakfólk við serútbúgving innan m.a. sálarfrøði, talipedagogik, ergo- og fysioterapi og sernámsfrøði veita sernámsfrøðiliga ráðgeving frá landinum. Hesi fakøkini eru somuleiðis ein natúrlig ábending um, hvar ábygdarbýtið millum námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving liggur. Kommunurnar hava í høvuðsheitum námsfrøðingar sum hægstu útbúgving, meðan landsins fakligu eindir hava tann tvørfakliga serkunnleikan, sum krevst, tá tørvur er á nærri kanningum, málsligum og motoriskum, sálarfrøðiligum metingum og serligum tvørfakligum tiltøkum.
Hetta ger greið faklig ábyrgdarbýti og tryggjar, at bæði kommunur og land hava vælskipaðar leiklutir og skyldur.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at dagføra og greiða lógargrundarlagið fyri dagstovnar, so økið samsvarar við dagsins fakligu krøv, samfelagsligu broytingar og tørvin hjá børnum og familjum.
Uppskotið styrkir bæði námsfrøðiligu karmarnar og samstarvið millum land og kommunur, og tryggjar, at øll børn fáa javnbjóðis og dygdargott tilboð.

Við uppskotinum verður ábyrgdarbýtið staðfest og greitt. Kommunurnar fáa dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd. Landið fær yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina við heimild at seta felags faklig stevnumið og karmar. Eisini verður skipað ein Samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið til tess at tryggja fakligt samskifti og menning, og í hesum sambandi verður sett eitt fakligt Dagstovnaráð at ráðgeva Samstarvsnevndini.

Lógin verður somuleiðis dagførd, so tað verður greitt, hvørji tilboð og hvørjar aldursbólkar hon fevnir um. Dagstovnar sambært lógini eru nú dagrøkt, vøggustova, barnagarður og frítíðarstovnur til børn í forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk.
Tilboð til eldri børn og ung verða skilmarkað sum frítíðarklubbar og ungdómshús, og fevnir dagstovnalógin ikki um hesi tilboð, tí tey hava annað innihald og onnur faklig krøv. Henda avmarking ger rættarstøðuna greiðari og tryggjar, at øll tilboð verða skipað eftir sínum serliga endamáli.

Uppskotið lógfestir eisini eina greiða skipan fyri ráðgeving: Kommunurnar skulu tryggja atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving – einsamallar ella í samstarvi við aðrar kommunur – og landið skal veita sernámsfrøðiliga ráðgeving. Hetta styrkir dygd, fyribyrging og fakligan samanhang á økinum.

Við dagføringini verður stovnað eitt nútíðarhóskandi og fakliga burðardygt grundarlag, sum tryggjar, at øll børn í Føroyum fáa somu góðu menningarmøguleikar, og at foreldur og stovnar fáa greið rættarviðurskifti og javnbjóðis tænastur, óheft av bústaði.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Kommunufelagnum, Kommunala arbeiðsgevarafelagnum, Føroya Pedagogfelagi, Javnstøðunevndini, Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, MEGD , Brekumboðinum, Hjálparfólkafelagnum, Áhugafelagnum fyri dagstovnanámsfrøði, Felags Foreldraráðnum í Tórshavnar kommunu, Undirvísingarstýrinum, Sernámi, NÁM, Almannaverkinum, Barnaverndarstovuni, GIGNI, umframt øllum aðalráðunum. Harumframt hevur uppskotið verið sent í almenna hoyring.

Hoyringarfreistin var upprunaliga ásett til 5. januar. Í hoyringartíðarskeiðnum hava fleiri hoyringarpartar biðið um longda svarfreist. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur játtað longda freist fyri hesar hoyringarpartar, tí mett verður, at teir hava serligan týdning fyri, at uppskotið verður nøktandi upplýst og væl fyrireikað.

Viðmerkingar eru komnar frá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum, Føroya Pedagogfelagi, Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, Undirvísingarstýrinum, Sernámi, Almannaverkinum, Almanna- og heilsumálaráðnum, Felags Foreldraráðnum í Tórshavnar kommunu, MEGD, Javna, Kommunufelagnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, umframt kommunalum og fakligum ráðgevingum, herundir Námsfrøðiligari ráðgeving í Tórshavnar kommunu.

Harumframt eru hoyringarskriv komin frá einstøkum fakpersónum við drúgvum royndum innan dagstovnaøkið og námsfrøðiliga ráðgeving, umframt frá áhugapørtum.

Jógvan Philbrow – fakfólk við nógvum arbeiðsroyndum

Katrin Bjarnadóttir –fakfólk við nógvum arbeiðsroyndum; hevur verið stovnsleiðari, taluráðgevi hjá Sernámi, forskúlapedagogur og barnagarðspedagogur.

Maria Heradóttir – fakliga virkin á dagstovnaøkinum við serligum fokus á málmenning, fleirmæltum børnum og námsfrøðiligum kørmum.

Anja Clementsen – kommunalur námsfrøðiligur ráðgevi við umleið 10 ára roynd; arbeiðir við ráðgeving, inklusjón og børnum við serligum tørvi.

Maria Johannesen – fakfólk; arbeitt við námsfrøðiligari ráðgeving í 17 ár, inklusjón og fyribyrgjandi arbeiði.

Ingun Vágsheyg Niclasen – fakfólk og hevur hægri námsfrøðiliga útbúgving; starvast hjá Sernám sum taliráðgevi.

Eitt ummælisskjal er gjørt, sí niðanfyri, har innkomnu hoyringarskrivini eru samanumtikin og viðgjørd á ein skipaðan hátt. Øll innkomin hoyringarskriv eru harumframt løgd við sum fylgiskjøl.

1.5.1 Samanumtøka av innkomnum hoyringarskrivum

Hoyringarskrivini vísa breiðan áhuga fyri dagstovnaøkinum og greiða semju um, at tørvur er á at dagføra dagstovnalóggávuna, sum er frá 2000. Hoyringin vísir samstundis, at fleiri sjónarmið snúgva seg bæði um sjálvt lógaruppskotið og um breiðari og strukturellar avbjóðingar á dagstovnaøkinum, sum røkka út um endamálið við hesum stigvísa lógararbeiðinum.

Ein partur av hoyringarviðmerkingunum viðvíkir beinleiðis teimum kørmum, sum uppskotið setur. Hetta fevnir m.a. um orðingar í lógartekstinum, ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, ásetingar um aldursbólkar og dagstovnatilboð, reglur um upplatingartíðir og stongdar dagar, broytingina frá Dagstovnaráði til Samstarvsnevnd, umframt skipanina av námsfrøðiligari og sernámsfrøðiligari ráðgeving.

Ein stórur partur av viðmerkingunum snýr seg eisini um dagstovnaøkið sum heild, undir hesum normeringar, starvsfólkatrot, arbeiðstreytir, fakliga menning og fíggjarligar fortreytir. Hesar viðmerkingar vísa á grundleggjandi og langtíðar avbjóðingar, sum ikki verða loystar við hesum lógaruppskotinum, men sum verða tiknar upp í næsta stigi av arbeiðinum við dagføring av dagstovnalóggávuni.

1.5.2 Ábyrgdarbýti millum land og kommunur

Uppgávubýtið millum kommunur og land

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við nógvum arbeiðsroyndum, fakfólk við hægri námsfrøðiligum førleikum, kommunalur námsfrøðiligur ráðgevi við umleið 10 ára roynd, Námsvísindadeildin, Almannaverkið, Almanna- og heilsumálaráðið, Undirvísingarstýrið, Føroya Pedagogfelag, Sernám og MEGD – vísa á, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur verður mett sum ógreitt.

Hoyringarpartarnir vísa somuleiðis á ótta fyri, at landið í praksis kann frásiga sær yvirskipaðu fakligu ábyrgdina, og á vanda fyri ójavnum tænastustigi og seinkingum í at veita hjálp, serliga í samansettum og tvørfakligum málum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísir á, at dagstovnaøkið framvegis er lagt út til kommunurnar at reka, og at endamálið við lógaruppskotinum er at gera ábyrgdarbýtið greiðari – ikki at broyta tað.

Sambært uppskotinum hava kommunurnar dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd og skulu tryggja atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving. Landið hevur

yvirskipaða námsfrøðiliga ábyrgd og veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving. Hetta er ásett í § 3 b og § 5 a.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið metir tí, at uppskotið leggur upp til eina greiðari skipan enn verandi lógargrundarlag.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; greiðari viðmerkingar til §§ 3 b og 5 a.

Dagstovnaráðið og Samstarvsnevndin

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við nógvum arbeiðsroyndum, Námsvísindadeildin, Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu, Føroya Pedagogfelag og Undirvísingarstýrið – vísa á, at niðurlaðingin av Dagstovnaráðnum kann hava neilig árin á fakliga breidd og demokratiska umboðan. Samstarvsnevndin verður mett sum ófullfíggjað, um hon stendur einsamøll sum skipan.

Somu hoyringarpartar vísa harumframt á ótta fyri, at um manningin av Samstarvsnevndini verður ásett í kunngerð, kann faklig breidd og gjøgnumskygni minka, og at foreldraumboð og fakligir partar ikki verða tryggjað.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og tekur undir við, at faklig breidd og umboð eiga at verða tryggjað. Uppskotið er tí broytt soleiðis, at ein tvíliðað skipan verður sett í verk.

Sambært broytta uppskotinum verður Samstarvsnevndin sett í lóg sum ein land–kommunu samstarvspallur við ábyrgd fyri strategiskri samskipan. Samstundis verður Dagstovnaráðið endurskapað sum eitt fakligt ráð við breiðari umboðan og ráðgevandi leikluti.

Dagstovnaráðið verður sett inn sum stk. 2 í § 3 c. Við heimild í stk. 3 í § 3 c verður ásett í kunngerðheimild, hvussu ráðið verður mannað. Tað er greitt ásett, at faklig sjónarmið skulu vera grundarlag fyri manningini, og at ráðið skal hava neyðugan fakligan førleika.

Uppskotið leggur tí ikki upp til at avmarka fakliga ávirkan, men at skapa greiðari og meira haldgóðar karmar enn í verandi skipan.

Avleiðing í uppskotinum

Broyting.
Niðurstøða: Lógartekstur broyttur.

1.5.3 Hvønn fevnir dagstovnalógin um

Aldursmark fyri byrjan í vøggustovu og dagrøkt (§ 3, stk. 2 og stk. 3)

Føroya Pedagogfelag tekur greiða støðu til ásetingina um aldursmark og mótmælir orðingini í uppskotinum, har seks mánaðir eru settir sum byrjanaraldur fyri dagstovnatilboð. Felagið metir, at seks mánaðir er ov tíðliga sum vanligur byrjanaraldur á dagstovni og mælir til, at aldursmarkið verður broytt til ellivu mánaðir.

Felagið vísir á, at tað í heilt serligum førum kann vera fakliga grundað, at barn byrjar á dagstovni longu við seks mánaða aldri, men leggur dent á, at hetta eigur at vera undantak og ikki høvuðsregla í lóggávuni. Føroya Pedagogfelag leggur tí upp til eina skipan, har ellivu mánaðir er meginregla, meðan seks mánaðir bert verður nýtt sum undantak.

Undirvísingarstýrið vísir í sínum hoyringarskrivi á, at ásetingin um byrjanaraldur á dagstovnum hevur beinleiðis fakligar, skipanarligar og fíggjarligar avleiðingar. Stýrið ger vart við, at yngri børn krevja hægri normering og størri fakligt rásarúm, og at ein lógarfesting av ov lágum byrjanaraldri tí eigur at verða mett í ljósi av hesum fakligu fortreytum. Undirvísingarstýrið vísir harumframt á, at ásetingin eigur at samsvara við verandi barsilsskipan og við aðrar reglur á barna- og útbúgvingarøkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at fastseting av seks mánaða aldri sum lágmark fyri dagstovnatilboð kann bróta við verandi praksis í fleiri kommunum, har børn ofta byrja seinni. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir, at tørvur barnsins á dagstovnatilboði, tá barnið er seks mánaðir gamalt, heldur eigur at verða viðgjørdur sum eitt frávik sambært § 3, stk. 3, enn sum ein almenn og bindandi aldursáseting í lóg.

Støða hjá ráðnum
Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og er samt í, at orðingin um byrjanaraldur eigur at endurspegla bæði trivnað barnsins, fakligar fortreytir á dagstovnum og verandi skipan við barsilstíð. Ráðið metir, at tað er umráðandi, at lógarásetingin ikki ger ov tíðliga stovnbyrjan til høvuðsreglu, men samstundis gevur rúm fyri undantøkum í serligum førum.

Avleiðing í uppskotinum
Broyting.

Niðurstøða
Lógarteksturin er broyttur, soleiðis at byrjanaraldurin í vøggustovu og dagrøkt verður settur til tíggju mánaðir, samsvarandi núverandi barsilstíð, við heimild til undantøk sambært § 3, stk. 3.

Aldursbýti á dagstovnum

Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu vísir á, at aldursbýtið á dagstovnum byggir á ein ávísan námsfrøðiligan leist. Foreldraáðið setir spurning við, um hesin háttur eigur at vera einasti møguligi, tá ið hann verður festur í lógatekstin. Mælt verður til, at § 3, stk. 4 verður orðað meira opið, so kommunur lættari kunnu loyva øðrum námsfrøðiligum skipanum, har børn ikki verða býtt eftir aldri.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingina til eftirtektar og vísir á, at viðmerkingarnar til § 3 eru gjørdar greiðari. Sambært uppskotinum geva samansett tilboð

kommununum rásarúm at skipa dagstovnatilboð eftir lokalum og námsfrøðiligum tørvi, eisini við ymiskum bólkabýtum.

Undantaksloyvi eru sambært uppskotinum ætlað sum ein fakliga grundaður møguleiki at nýta aðrar skipanarhættir innan greiðar og tryggar karmar.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; greiðari viðmerkingar til § 3.

Dagrøkt

Undirvísingarstýrið undrast á, at dagrøkt og vøggustova í § 3, stk. 2 verða javnsett sum *námsfrøðilig tilboð*

Sernám vísir á, at dagrøkt í galdandi lóggávu er lýst sum ansing og ikki sum eitt fult námsfrøðiligt tilboð. Spurningur verður settur við, um dagrøkt eigur at verða javnsett við dagstovnar, tá faklig krøv og starvsfólkasamanseting eru ymisk. Hetta kann vera eitt ógreitt fakligt signal, serliga í mun til krøv um útbúgving og dygd.

Fakfólk við drúgvum royndum á dagstovnaøkinum ivast í, um dagrøkt og dagstovnar kunnu javnsetast fakliga, serliga tá talan er um børn við serligum tørvi. Víst verður á, at ráðgeving og fakligur stuðul krevur nógv av starvsfólkum, og at skipanin longu er strongd.

Fakfólk fakliga virkin á dagstovnaøkinum við serligum fokus á málmenning og fleirmæli vísa á, at málmenning ikki er nágreinað, hóast dagrøkt nú verður fevnd sum námsfrøðiligt tilboð. Ivast verður í, um dagrøkt hevur karmar og førleikar til at arbeiða systematiskt við málmenning, serliga fyri fleirmælt børn, og hvussu námsfrøðilig ráðgeving í praksis er ætlað at fevna dagrøkt.

Fakfólk innan námsfrøðiliga ráðgeving vísa á, at kommunal námsfrøðilig ráðgeving, sum skal fevna bæði dagstovnar og dagrøkt, kann fáa trupulleikar við fakligum tyngdarmuni. Spurningur verður settur við, hvussu ráðgevingin skilur seg fakliga frá tí arbeiði, sum longu verður gjørt í dagrøktini.

Kommunalur námsfrøðiligur ráðgevi við umleið 10 ára royndum vísir á, at nógv av tí, sum í praksis verður kallað fyribyrgjandi arbeiði, í veruleikanum er sernámsfrøðiligt. Tá dagrøkt verður fevnd sum námsfrøðiligt tilboð, kann markamótið millum kommunala og sernámsfrøðiliga ábyrgd gerast ógreitt.

Kommunufelagið vísir á, at orðingin í uppskotinum hevur elvt til óvissu hjá smærri kommunum. Í summum kommunum fevnir dagrøkt í praksis um børn frá umleið 10 mánaða aldri og til og við 2. flokk. Aldursbýtið í § 3, stk. 2 kann tulkast ov stirvið í mun til verandi skipanir í smáum kommunum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar

Uppskotið er tí tillagað soleiðis, at greitt verður skilt millum aldursbundin stovnstilboð og dagrøkt sum skipanarhátt. Vøggustovur, barnagarðar og frítíðarstovnar eru staðfest sum aldursbundin námsfrøðilig tilboð, meðan dagrøkt er lýst sum ein serligur skipanarháttur sambært § 3, stk. 2, nr. 4.

Samstundis er greitt ásett í serligu viðmerkingunum, at dagrøkt er fevnd av teimum almennu krøvunum í dagstovnalógini um trygd, eftirlit og námsfrøðiligt virksemi. Uppskotið leggur ikki upp til at taka støðu til, hvat slag av tilboði er best í hvørjum einstøkum føri, men at skapa greiðari karmar, sum taka hædd fyri bæði lokalum veruleikum og foreldravónum.

Avleiðing í uppskotinum

Broyting.

Niðurstøða: Lógartekstur og serligar viðmerkingar er broytt; dagrøkt skilgreinað sum serligur skipanarháttur og ikki sum aldursbundið stovnstilboð.

Aldursavmarking fyri frítíðarstovnar

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við nógvum arbeiðsroyndum, fakfólk við hægri námsfrøðiligum førleikum, MEGD, Javni, Undirvísingarstýrið, Føroya Pedagogfelag og Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu – meta, at aldursavmarkingin, serliga til og við 2. flokk, er ov stirvin. Tað verður víst á, at hetta kann hava neiliga ávirkan á børn við serligum tørvi.

Kommunufelagið vísir á, at aldursavmarkingin kann ávirka verandi kommunal frítíðartilboð.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísir á, at aldursbýti verður lógarfest fyri at tryggja greiðar og kendar karmar, m.a. tí at aldursbýti verður brúkt sum grundarlag fyri foreldragjald og normering. Sambært uppskotinum eru frávik loyvd í serligum førum, sbr. serligar viðmerkingar til § 3, stk. 3.

Endamálið við uppskotinum er harumframt at gera ásetingina um frítíðarstovnar greiðari og at skilja millum dagstovnatilboð og onnur frítíðartilboð. Uppskotið forðar ikki kommunum í at bjóða onnur frítíðartilboð til eldri børn undir øðrum kørmum.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; heimildir til frávik framhaldandi galdandi.

Fýra vikur samanhangandi afturlating

Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu vísir á, at dagstovnar bert eiga at kunna verða stongdir í tríggjar samanhangandi vikur, og ikki í fýra vikur, sum lagt verður upp til í § 3 a,

stk. 2. Felags Foreldraráðið metir, at ein longri afturlating kann skapa avbjóðingar fyri familjur við avmarkaðum møguleikum fyri barnaansing í summarfrítíðini.

Kommunufelagið vísir á, at krøvini í uppskotinum eru strangari enn tey, sum galda fyri landsins stovnar, t.d. fólkaskúlan.

Kommunufelagið tekur ikki undir við kravinum um, at dagstovnar í mesta lagi kunnu vera stongdir fimm vikur tilsamans um árið. Hetta meta tey, er eitt nýtt og óneyðugt krav, sum kommunur, foreldur ella starvsfólk ikki hava eftirspurt, og sum fer at hava munandi avleiðingar, serliga í smærri kommunum. Stongdir dagar kunnu harumframt vera neyðugir vegna bráðneyðugar ella umfatandi umvælingar, og siðvenjur kring afturlating eru ymiskar kring landið. Í praksis er tað tí ógjørligt hjá nógvum kommunum at halda seg undir eitt samlað árshámark á fimm vikur. Kommunufelagið mælir tí til, at ásetingin um eitt samlað árshámark verður strikað, meðan møguleikin fyri samanhangandi summarstongsil verður varðveittur.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at uppskotið leggur upp til, at dagstovnar ikki verða stongdir meira enn fýra samanhangandi vikur um summarið, og metir, at tað eigur at vera upp til kommunurnar sjálvar at meta um tørvin á afturlating og skipan í ferium. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið heldur, at hetta eigur ikki at verða ov ítøkiliga regulerað í lóg.

Kommunufelagið vísir eisini á, at manglandi samskipan millum dagstovnaøkið og skúlaøkið skapar trupulleikar fyri foreldur, kommunur og starvsfólk. Hóast uppskotið leggur dent á kunning til foreldur, metir Kommunufelagið, at kunning einsamøll ikki er nøktandi. Felagið mælir tí til, at tað verður tryggjað ein betri og bindandi samskipan millum fólkaskúlar, dagstovnar og frítíðarstovnar, annaðhvørt beinleiðis í lógaruppskotinum ella við, at landsstýrismaðurin tekur stig til eina slíka samskipan í samstarvi við kommunurnar, so størri fyrisigiligheit kann skapast fyri kommunur og foreldur.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðurkennir, at fleiri kommunur longu í dag hava samanhangandi afturlating um summarið, og at henda skipan hevur virkað í praksis. Tí tekur ráðið undir við, at dagstovnar sambært lógaruppskotinum kunnu vera stongdir í upp til fýra samanhangandi vikur, og at henda áseting m.a. kann nýtast til frítíð hjá børnum og starvsfólkum og til neyðugar fyrireikingar og umvælingar.

Ráðið vísir tó framvegis á, at tað er týdningarmikið at áseta eitt samlað hámark fyri afturlating, fyri at tryggja eina rímiliga javnvág millum tørvin hjá familjum og skipanarligu fyriskipanina hjá kommununum. Ásetingin um samanhangandi fýra vikur skal síggjast í ljósinum av, at talan er um børn í aldrinum 0–6 ár, sum hava serligan tørv á støðugari vaksnari umsorgan, og at afturlatingartíðin í størstan mun eigur at samsvara við møguleikarnar hjá foreldrum og øðrum umsorganarpersónum at halda feriu, og er ein hámarkstíð á fýra samanhangandi vikur tí rímilig.

Viðvíkjandi áheitanini um at strika ásetingina um samlaða afturlating upp til fimm vikur um árið, tekur ráðið viðmerkingarnar til eftirtektar. Ráðið vísir tó á, at ásetingin er ætlað at skapa

greiðar og fyrisigiligar karmar fyri familjur og børn, og at hon ikki er ætlað at forða fyri neyðugari afturlating vegna umvælingar, trygd ella aðrar serligar umstøður.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; Gjørt viðmerkingar greiðari til § 3 a, stk. 2.

Frítíðarstovnar og upplatingartíðir

MEGD og Javni vísa á, at hámarkið fyri afturlatingartíðir á fimm vikur ikki fevnir um frítíðarstovnar. Hetta verður mett at kunna føra til ójavna í ansingartrygd og møguligan óbeinleiðis mismun, serliga fyri børn við serligum tørvi og teirra familjur.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skilur álvaran í viðmerkingunum um ansingartrygd. Uppskotið hevur tó eitt avmarkað og stigvíst endamál, ið er at greiða reglurnar fyri kommunalt riknar dagstovnar og at áseta eitt felags hámark fyri afturlatingartíðir á hesum øki.

Frítíðarstovnar eru skipanarliga knýttir at skúlanum og verða í dag skipaðir ymist í kommununum. Uppskotið broytir ikki hesa grundskipan, men gevur kommununum møguleika at hava frítíðarstovnar opnar í skúlaferium.

Ráðið viðurkennir, at spurningurin um javnbjóðis ansingartrygd í ferium er týdningarmikil, men metir, at hetta er ein breiðari skipanarligur og fíggjarligur spurningur, sum eigur at verða tikin upp í øðrum stigi av arbeiðinum.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; evnið ætlað at verða tikið upp í øðrum stigi.

1.5. 4 Námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving

Uppgávubýtið millum námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving (§ 5 a)

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við drúgvum arbeiðsroyndum, fakfólk við hægri námsfrøðiligum førleikum, kommunalir námsfrøðiligir ráðgevar, Sernám, Námsfrøðilig ráðgeving í Tórshavnar kommunu, Undirvísingarstýrið og Føroya Pedagogfelag – vísa á, at uppskotið kann skapa ógreitt ábyrgdarbýti millum kommunala námsfrøðiliga ráðgeving og landsins sernámsfrøðiligu ráðgeving.

Hoyringarpartarnir vísa á ótta fyri fleiri stigum (“hurðum”) í skipanini, seinkingum í málsviðgerð og óvissu um fakliga stigskipan og ábyrgd, serliga í samansettum málum.

Umframt hetta hava ávísir hoyringarpartar – fakfólk við drúgvum royndum innan námsfrøðiliga ráðgeving og kommunalir ráðgevar – eisini víst á, at uppskotið stuðlar undir eina greiðari skipan enn verandi støðu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og metir, at § 5 a ásetir ein meginbygnað og eitt greiðari ábyrgdarbýti, men ikki ítøkiligar arbeiðsgongdir.

Sambært uppskotinum skulu kommunurnar tryggja atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving, meðan landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, tá tørvur er á serligum ella samansettum førleikum. Uppskotið leggur tí upp til eina stigskipaða ráðgeving.

Ráðið vísir á, at nærri skipanir, arbeiðsgongdir og samskipan verða orðaðar í sambandi við íverksetingina og í víðari arbeiði.

Avleiðing í uppskotinum

Broyting (orðingartillaging).
Niðurstøða: Lógartekstur tillagaður; skipanarligur karmur staðfestur.

Kunngerð sambært § 5 a

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við hægri námsfrøðiligum førleikum, Sernám, Undirvísingarstýrið og Námsfrøðilig ráðgeving í Tórshavnar kommunu – vísa á, at kunngerðin sambært § 5 a eigur at vera klár, samstundis sum lógin verður sett í gildi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísir á, at lógin fyrst skal veita neyðugu heimildina, áðrenn kunngerð kann setast í gildi. Fyriliggjandi uppskot ásetir ábyrgdarbýtið millum land og kommunur, meðan kunngerðin skal áseta nærri reglur fyri, hvussu samstarvið skal virka í praksis.

Ráðið metir, at omanfyri nevnda kunngerð eigur at verða orðað, um henda lóg verður samtykt. Ráðið vil vísa á, at í løtuni verður sernámsfrøðiliga økið endurskoðað, og merkir hetta, at ein komandi kunngerð fer at taka støði í nevndu endurskoðan.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; kunngerð orðast í sambandi við íverkseting.

Førleikakrøv til kommunalar námsfrøðiligar ráðgevar

Sernám, Námsfrøðilig ráðgeving í Tórshavnar kommunu, kommunalir námsfrøðiligir ráðgevar og fakfólk við serligum førleikum innan málmenning og inklusjón vísa á, at uppskotið ásetir skyldu hjá kommunum at veita námsfrøðiliga ráðgeving, men sigur ov lítið um førleikakrøv, dygd og at tryggja javnbjóðis tænastu.

Harumframt verður víst á ótta fyri, at ráðgevingin kann gerast ov fyrisitingarlig og taka orku frá kjarnuuppgávunum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og tekur undir við, at dygd og fakligir førleikar eru avgerandi fyri, at ráðgevingin verður gagnlig í praksis.

Við § 5 a verður lógarfest, at kommunur skulu veita námsfrøðiliga ráðgeving, og at landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan. Nærri krøv til førleikar, samskipan og arbeiðsgongdir verða ásett í kunngerð.

Ráðið metir, at arbeiðið við dygd og førleikakrøvum er ein partur av starvssamanseting, sum krevur neyvari viðgerð við avvarðandi partar, áðrenn broyting verður gjørd hesum viðvíkjandi.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; nærri krøv orðast í kunngerð og íverkseting.

Fíggjarligar og skipanarligar avleiðingar av § 5 a

Sernám vísir á, at uppskotið kann elva til øktan eftirspurning eftir sernámsfrøðiligari ráðgeving, uttan at tað er greitt, hvussu hetta skal fíggjast. Tað verður ávarað um, at uttan eina greiða stigskipan kann skipanin annaðhvørt elva til ov nógvar áheitanir ella til ójavna nýtslu av sernámsfrøðiligum tænastum.

Kommunufelagið vísir á, at nógvar kommunur uppliva, at landið ikki røkkur sínum sernámsfrøðiligu uppgávum, við longum bíðitíðum og vanda fyri, at tilboð hvørva. Hetta førir til, at kommunur kenna seg noyddar at byggja egnar skipanir uttan fíggjarligt grundarlag, hóast talan er um landsábyrgd. Kommunufelagið mælir tí til, at fíggjarligu avleiðingarnar verða greitt viðurkendar, at Sernám verður munandi styrkt, og at landið loysir sínar egnu uppgávur, áðrenn ábyrgdir verða greiðari býttar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við skilnaðinum millum kommunala námsfrøðiliga ráðgeving og sernámsfrøðiliga ráðgeving, veitta av landinum (Sernám). Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísir tó á, at uppskotið kann hava fíggjarligar og skipanarligar avleiðingar, tí Sernám longu hevur bíðitíðir, og arbeiðsbyrðan kann vaksa, um sernámsfrøðilig ráðgeving skal veitast í størri mun.

Fakfólk við royndum innan fyribyrgjandi arbeiði vísa harumframt á, at nógv av tí arbeiði, sum í dag verður mett sum fyribyrgjandi, í veruleikanum er sernámsfrøðiligt, og at ein ógreið stigskipan kann flyta arbeiðsbyrðuna heldur enn minka hana.

Undirvísingarstýrið setur spurning við, hvussu tryggjað verður, at landsstovnar hava nøktandi karmar og tilfeingi til at røkja uppgávurnar.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og vísir á, at uppskotið í høvuðsheitum lógarfestir og skipar verandi praksis heldur enn at áseta nýggjar sjálvstøðugar fíggjarligar skyldur hjá kommunum ella Sernámi.

§ 5 a ásetir ein skipanarligan karm fyri stigskipaða ráðgeving, har kommunurnar hava ábyrgdina av námsfrøðiligari ráðgeving, meðan landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving, tá tørvur er á serligum ella samansettum førleikum.

Ráðið ásannar, at spurningar um arbeiðsbyrðu, tilfeingi og fígging eru viðkomandi, men metir, at hesir spurningar eiga at verða loystir í sambandi við íverksetingina og í næsta stigi av arbeiðinum, í sambandi við at hildið verður áfram við at menna og tillaga Sernám og aðrar stuðulsskipanir á barnaøkinum .

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.

Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; fíggjarlig og skipanarlig viðurskifti verða handfarin í íverkseting og næsta stigi.

1.5. 5 Aðrar viðmerkingar

Umframt viðmerkingarnar til høvuðspunktini í lógaruppskotinum hava hoyringarpartar sett fram ávísar aðrar viðmerkingar.

Fakfólk við drúgvum arbeiðsroyndum hava víst á, at strikan av § 2, stk. 2 kann skiljast sum ein innihaldslig broyting.

Undirvísingarstýrið hevur sett spurningar við ábyrgdarbýtið og onnur skipanarlig viðurskifti.

Fakfólk, fakliga virkin á dagstovnaøkinum við serligum fokus á málmenning og fleirmæli, vísa á, at málmenning og fleirmæli ikki eru týðiliga nevnd sum sjálvstøðug faklig stevnumið, og at hugtøk sum “tørvur” eru ógreið og kunnu elva til ymiskar metingar.

Sernám og fakfólk við hægri námsfrøðiligum førleikum vísa á, at dagrøkt verður javnstillað við onnur námsfrøðilig tilboð.

Kommunufelagið vísir á, at kunngerðarheimildirnar í uppskotinum kunnu skiljast sum víðar og geva landinum ov nógv vald, við óvissu um ábyrgd og skyldur.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og vísir á, at strikanin av § 2, stk. 2 er ein teknisk flyting, har ásetingin verður flutt til eina aðra grein (§ 3b, stk. 2) í einum sambæriligum, men greiðari samanhangi. Talan er tí ikki um eina innihaldsliga broyting.

Ráðið vil vísa á, at ábyrgdarbýtið framgongur greitt av serligu viðmerkingunum til § 3 b.

Ráðið tekur undir við, at málmenning er týdningarmikil partur av menning og trivnaði hjá børnum. Hesi fakligu evni eru ætlað at verða viðgjørd í víðari arbeiðiðinum við felags fakligum stevnumiðum og leiðbeiningum sambært § 3 b, stk. 2.

Ráðið vísir á, at dagrøkt sambært lógini er partur av dagstovnaøkinum og tískil er umfatað av endamálsásetingini í lógini. Uppskotið tekur tó ikki støðu til faklig krøv til starvsfólk í dagrøkt á hesum stigi.

Viðvíkjandi kunngerðarheimildum vísir ráðið á, at hesar eru avmarkaðar til samskipan, mannagongdir og ábyrgdarbýti. Heimildirnar kunnu ikki nýtast til at áseta nýggjar fíggjarligar ella umsitingarligar byrðar hjá kommununum.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; viðmerkingar greiddar, og tekniskar tillagingar gjørdar

1.5.6 Viðurskifti, ið fylla nógv í hoyringarsvarunum, men sum hetta dagstovnauppskotið ikki beinleiðis fevnir um

Rættartrygd og orðingin “kann” vs. “skal”

Fleiri hoyringarpartar –MEGD, Javni, Sernám, Undirvísingarstýrið, Felags Foreldraráðið í Tórshavnar kommunu, Føroya Pedagogfelag og fakfólk við drúgvum royndum innan námsfrøðiliga ráðgeving – meta, at orðingin “kann” í § 3 kann minka rættartrygdina og føra til ójavna atgongd og postnummarrættartrygd, serliga fyri børn við serligum tørvi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og viðurkennir, at orðingin “kann” reisir spurningar um rættartrygd. Samstundis metir ráðið, at ein broyting til “skal” hevði verið ein grundleggjandi rættinda- og fíggjarspurningur, sum krevur eitt breiðari heildaruppskot og eina neyvari politiska viðgerð.

Endamálið við hesum stigvísa uppskotinum er at skapa greiðari karmar og ábyrgdarbýti. Spurningurin um bindandi rættindi er tí ætlaður at verða tikin upp í einum øðrum stigi av arbeiðinum.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; rættindaspurningur vístur til annað stig.

Markamót millum dagstovnalóggávu og almannalóggávu

Almannaverkið, Almanna- og heilsumálaráðið, Kommunufelagið og kommunalur námsfrøðiligur ráðgevi vísa á, at markamótið í § 5, stk. 3 millum dagstovnalóg og almannalóggávu er ógreitt og í praksis elvir til ósemjur um ábyrgd, avgerðarheimildir og tilboðsveitingar.

Kommunufelagið metir harumframt, at talan er um, rættarótrygd, at Almannaverkið í dag tekur avgerð í ivamálum, har stovnurin sjálvur er partur. Talan er um mál, har ivast verður um, hvørt eitt barn hevur "serligan tørv", sum er kommunal ábyrgd, ella "heilt serligan tørv", sum er landsábyrgd. Hóast talan er um fá mál, verða tey ofta kærd víðari, og verandi skipan er bæði seig og óheppin. Kommunufelagið mælir tí til, at § 5, stk. 3 verður broytt, so ivamál millum kommunur og Almannaverkið verða løgd beinleiðis fyri Føroya Kærustovn. Hetta fer at taka Almannaverkið burtur sum avgerðarmynduleika í egnum máli og tryggja skjótari og meira endaligar avgerðir, til frama fyri barnið og familjuna.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið mótmælir eisini, at Almannaverkið framhaldandi skal taka avgerð í ivamálum um veiting av tilboðum sambært § 5, stk. 3. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið mælir til, at hendan avgerð verður løgd til Føroya Kærustovn sum uttanveltaðan myndugleika.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið viðurkennir, at markamótið millum dagstovnalóggávu og almannalóggávu kann vera fløkt og krevur samskipaða lógarviðgerð millum fleiri ráð.

Ráðið metir tó, at hesir spurningar liggja uttan fyri endamálið við hesum uppskotinum og tí ikki geva grundarlag fyri at gera broytingar í lógartekstinum. Ráðið er farið undir eina tilgongd at arbeiða víðari við hesum spurningum í samstarvi við aðrar viðkomandi myndugleikar.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; evnið víst til víðari lógararbeiði.

Mannarættindi, rímiligar tillagingar og brekrættindi

MEGD og Javni vísa á vanda fyri regressión í rættindum og manglandi rættartrygd, serliga í mun til rímiligar tillagingar.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar, men metir, at spurningar um bindandi mannarættindalig krøv, rímiligar tillagingar og møguliga regressión í rættindum krevja eina breiðari mannarættindaliga og lógarpolitiska viðgerð.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; mannarættindaspurningar vístir til breiðari arbeiði.

Starvsfólkasamanseting, 2/3-kravið um námsfrøðingar

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk við drúgvum royndum á dagstovnaøkinum, Føroya Pedagogfelag, Námsvísindadeildin, Sernám, áhugafeløg fyri børn við serligum tørvi og kommunalir myndugleikar – leggja dent á, at starvsfólkasamanseting hevur avgerandi týdning fyri fakliga dygd, tryggleika og inklusjón.

Hoyringarpartarnir vísa á, at:

- 2/3-kravið um námsfrøðingatímar hevur greitt fakligt endamál,
- nógv arbeiði í dagstovnum í dag er fyribyrgjandi og sernámsfrøðiligt,
- hjálparfólk ikki kunnu røkja kjarnuuppgávur,
- og at børn við serligum tørvi eru serliga tongd at fakligum og støðugum vaksnum.

Kommunufelagið vísir á, at kravið um, at í minsta lagi tveir triðingar av starvsfólkunum á dagstovnaøkinum skulu vera útbúnir námsfrøðingar, hevur verið órealistiskt, síðani tað varð sett í lóg. Í veruleikanum livir næstan eingin kommuna upp til hetta kravið, m.a. tí útboðið av útbúnum námsfrøðingum er alt ov lítið, kappingin um námsfrøðingar frá øðrum økjum, so sum skúla- og almannamálum, er vaksin, og landið í nógv ár ikki hevur útbúgvið nóg mikið. Kommunufelagið leggur dent á, at kommunurnar ynskja eitt høgt fakligt støði á dagstovnaøkinum, men at tað er ógjørligt at lyfta henda veruleika einsamallar. Felagið mælir tí til, at lógarásetingin um starvsfólkabýtið verður endurskoðað, so hon verður realistisk, og at ein felags og bindandi ætlan millum land og kommunur verður gjørd fyri útbúgving, fakliga menning og eina stigvísa hækking av fakliga støðinum. Harumframt verður mælt til at opna lógina fyri fleiri fakbólkum innan námsfrøðiliga økið og at gera tað greitt bæði í lóg og viðmerkingum, at landið hevur ábyrgdina av útbúgvingartørvinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísir á, at ásetingin í § 8, stk. 4, um starvsfólkabýtið (í minsta lagi 2/3 námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 hjálparfólkatímar) eigur at verða dagførd og endurmetast í ljósinum av hesum fakliga veruleika. Sambært Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum eigur starvsfólkasamansetingin í størri mun at kunna rúma fleiri ymiskum námsfrøðiligum útbúgvingum, samstundis sum dentur framvegis verður lagdur á fakliga dygd, trygd og trivnað hjá børnunum.

Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya vísir í sama høpi á, at verandi lógarásetingar og orðingar eru ov smalar í mun til ta fakligu menning, sum er farin fram á útbúgvingarøkinum. Deildin peikar á, at fleiri námsfrøðiligar útbúgvingar og førleikaprofilar í dag kunnu hava viðkomandi og hægri fakligan førleika til arbeiði á dagstovnaøkinum.

Harumframt vísa fleiri fakpersónar í hoyringsskrivunum á, at dagstovnalógin eigur at rúma eisini hægri námsfrøðiligum útbúgvingum og fakligum førleikum, ið eru mentir eftir verandi útbúgvingarskipan, og at hetta eigur at endurspeglast í lógar- og skipanarkørmum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vísir harumframt á, at ásetingin í § 8, stk. 1, um at leiðari á dagstovni skal vera námsfrøðingur, eigur at verða endurskoðað og dagførd, so eisini aðrar viðkomandi námsfrøðiligar og pedagogiskar útbúgvingar á hægri støði kunnu geva førleika til leiðslustørv. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir, at veruleikin á dagstovnaøkinum í dag

er, at fleiri ymiskar námsfrøðiligar útbúgvingar eru mentar, sum fakliga eiga at verða tiknar við í bæði leiðslu og starvsfólkasamanseting.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið ásannar, at verandi støða á dagstovnaøkinum er merkt av starvsfólkatroti og avbjóðingum við at røkka galdandi krøvum. Samstundis metir ráðið, at spurningar um starvsfólkasamanseting, útbúgvingarkrøv og arbeiðsmarknaðarligar fortreytir eru breiðari og tvørfaklig mál, sum ikki kunnu loysast við einari avmarkaðari lógarbroyting.

Hesi viðurskifti hava tí ikki verið partur av fyriliggjandi broytingaruppskoti, sum hevur til endamáls at seta yvirskipaðar námsfrøðiligar karmar og ábyrgdarbýti.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; starvsfólkaspurningur verður vístur til breiðari arbeiði.

Normering og støddá barnabólkum

Fleiri hoyringarpartar – fakfólk, fakfeløg, áhugafeløg fyri børn við serligum tørvi, Undirvísingarstýrið og foreldraumboð – vísa á, at normering og støddá barnabólkum eru grundleggjandi fortreytir fyri trivnað, menning og fakliga dygd.

Víst verður á, at:
• ov stórir bólkar og lág normering minkar støðufesti,
• børn við serligum tørvi verða serliga rakt,
• og at ráðgeving og inklusjón ikki kunnu virka uttan nøktandi tilfeingi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og viðurkennir, at normering og bólkastødd hava stóran týdning fyri, at børn trívast og mennast.

Samstundis metir ráðið, at áseting av ítøkiligum normeringarkrøvum liggur uttanfyri endamálið við hesum broytingaruppskoti. Hesi viðurskifti eru breiðari fakligir, arbeiðsmarknaðar- og fíggjarligir spurningar, sum krevja eitt víðari grundarlag.

Avleiðing í uppskotinum

Ikki broyting.
Niðurstøða: Eingin broyting í lógarteksti; normering og bólkastødd ætlað at verða tikin upp í komandi stigi.

1.5.7 Samanumtøka hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum

Uppskotið er grundað á samstarv, smidleika og eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Tað leggur ikki nýggjar, ógreiðar ella ófyrisigiligar byrðar á kommunurnar, men hevur til endamáls at skipa og greiða verandi karmar.

Har hoyringarpartar hava reist haldgóðar og væl grundaðar viðmerkingar innan endamálið við uppskotinum, eru hesar tiknar til eftirtektar og settar inn í lógaruppskotið. Hoyringarviðmerkingarnar hava, samantikið, givið grundarlag fyri ávísar broytingar og tillagingar, sum styrkja greidleika og skipanarliga haldførið í uppskotinum.

Viðmerkingar, ið vísa á breiðari, strukturellar ella rættindaligar spurningar, eru tiknar við í arbeiðsætlanina fyri næstu stig at dagføra dagstovnalóguna har tær krevja eina víðari og meira heildarorðaða viðgerð.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kommunur:
Lógaruppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommununrnar, tí kommunum verður álagt at tryggja atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving. Kommununrnar kunnu tó samstarva um felags námsfrøðiliga ráðgeving. Tørvurin á námsfrøðiligari ráðgeving kann tó vera ymiskur millum kommunur. Tí er trupult at meta heilt neyvt um kostnaðaravleiðingarnar á hesum stigi, og nærri metingar mugu gerast í samstarvi við kommunurnar, sum hava besta innlitið í veruliga raksturin.

Landið:
Sum lýst fyrr í viðmerkingunum (kap. 1.3), er tað landsmyndugleikin, í dag Nám, ið hevur landsins námsfrøðiligu ábyrgd. Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026 eru 300.000 kr. settar av til Nám at røkja yvirskipaða námsfrøðiliga ábyrgd sambært nýggju § 3 b, stk. 2. Talan er um fyrireikingar og fakliga samskipan í sambandi við menning av felags námsfrøðiligum karmum, leiðreglum og ráðgevingarskipan.
Talið av uppgávum og arbeiðsbyrða fer væntandi at hækka í 2027, og verður mett, at ein øking á 700.000 kr. er neyðug í 2027, og frameftir verður mett, at 1.000.000 skal til at fíggja eitt ársverk og tilhoyrandi rakstur í Námi.
Sernám røkir longu sernámsfrøðiliga ráðgeving fyri dagstovnaøkið sambært verandi praksis og hevur fakliga orku og skipanir til tess. Eingin eyka útreiðsla verður tí væntað hjá Sernámi.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar. Størsti parturin kann røkjast innan verandi skipanir við smávegis tillagingum. Høvuðsbroytingarnar fevna um at staðfesta leiklutin hjá Námi sum ein fakligan landsstovn, greiðari stigskipan í ráðgevingini og møguligt samstarv millum kommunur.
Somuleiðis kunnu ávísar umsitingarligar avleiðingar standast av, at kommununrnar og landsmyndugleikar skulu leggja virksemi teirra til rættis sambært broyttu reglunum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur avmarkaðar staðbundnar avleiðingar, vísandi til at smærri kommunur og útoyggjakommunur kunnu fáa størri umsitingarligan tørv viðvíkjandi námsfrøðiligari ráðgeving, tí tær hava ikki egnan fakligan stovn.
Hetta verður tó javnað við samstarvi millum kommunur ella við at keypa tænastu frá størri kommunum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur positivar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, serliga fyri:

- børn við serligum tørvi, ið fáa tryggjaða fakliga ráðgeving eftir stigvísari og gjøgnumskygdari skipan (§ 5 a), og
- foreldur, ið fáa greiðari reglur um upplating, afturlating og kunning frá kommununi (§ 3, stk. 4–5).

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið stuðlar undir og er í samsvari við altjóða sáttmálar, soleiðis:

ST-sáttmálin um rættindi barnsins (Barnarættindasáttmálin, 1992), við tað at barnsins trivnaður er settur í fokus.

Sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, við tað at skipanin fyri námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving (§ 5 a) tryggjar javnbjóðis atgongd til dygdargóðar tænastur.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættin hjá borgaranum.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar nýggjar ásetingar um gjøld ella nýtslugjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið leggur ikki nýggjar skyldur á einstaklingar ella privat feløg.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild til at:

1. Áseta nærri reglur um skipan, manning og virksemi hjá Samstarvsnevndini og Dagstovnaráðnum (§ 3 c, stk. 3), og

2. Áseta reglur um samskipan millum námsfrøðiliga ráðgeving og sernámsfrøðiliga ráðgeving, undir hesum reglur um upplýsingargongd, samstarv, ábyrgdarbýti og fakligar førleikar hjá ráðgevum. (§ 5 a, stk. 3)

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum heimild til atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið gevur ikki heimild til viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1 nr. 1.
Heitið á lógini verður stytt og tillagað til tað navn, sum verður brúkt í praksis í dag.

Til § 1 nr. 2.
Ásetingin um yvirskipaðu ábyrgd landsstýrismansins verður strikað úr endamálsorðingini og flutt við sama innihaldi til nýggja § 3 b.

Til § 1 nr. 3.
Við ásetingini í 2018 varð heimild sett inn í dagstovnalógina at seta Dagstovnaráð við tí endamáli at styrkja samstarvið millum land og kommunur á dagstovnaøkinum. Í ráðnum hava sitið umboð m.a. fyri Kommunufelagið, Mentamálaráðið (nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið), Námsvísindadeildina á Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Pedagogfelag og Javnstøðunevndina. Endamálið við ráðnum hevur verið at ráðgeva og menna fakliga arbeiðið á dagstovnaøkinum.

Endamálið við ásetingini um Dagstovnaráð hevur verið eitt týdningarmikið stig móti betri samstarvi, men royndirnar vísa, at skipanin ikki í fullan mun hevur megnað at tryggja tað samskipaða samstarvið, sum ætlað var.

Ásetingin um Dagstovnaráðið verður tí strikað, men flutt við nýggjum innihaldi til nýggja § 3 c. stk. 2, har hon fer at virka sum eitt fakligt ráðgevandi organ til Samstarvsnevndina, nýggja § 3 c. stk. 1.

Til § 1 nr. 4.
Serligar viðmerkingar til § 3 stk. 1-4.

Stk. 1.
Ásetingin er ein staðfesting av verandi praksis, men orðingin er dagførd fyri at gera ábyrgdarbýtið millum land og kommunu greiðari.

Ásetingin staðfestir, at kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og at kommunan hevur ábyrgdina av virkseminum á stovnunum. Við virksemi meinast við plássveiting, eftirlit og námsfrøðiligt virksemi á sjálvum stovninum.

Ásetingin stuðlar málinum um javnbjóðis námsfrøðilig tilboð kring landið og tryggjar, at ábyrgdarbýtið millum land og kommunur verður meir sjónligt.

Kommunan hevur fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið røkir yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært § 3 b, stk. 2.

Stk. 2.
Ásett verður hvørji námsfrøðilig tilboð lógin fevnir um, og staðfestir, hvat aldursbýtið á leið er og skipan av tilboðum.

Námsfrøðiligu tilboðini eru ávikavist dagrøktir, vøggustovur, barnagarðar og frítíðarstovnar. Viðmerkjast skal, at dagrøkt kann skipast sum serligur skipanarháttur sambært § 3, stk. 2, nr. 4, har endamálið við ásetingini er at skapa greitt og javnbjóðis grundarlag fyri dagstovnaøkið.

Kommunan hevur skyldu at tryggja, at tilboðini eru námsfrøðiliga fullgóð og hóskandi í mun til aldur og menning hjá børnunum.

Vøggustovur eru ætlaðar børnum í aldrinum 10 mánaðir til 3 ár, meðan barnagarðar eru frá 3 ár fram til skúlagongd.

Frítíðarstovnar eru ætlaðir skúlabørnum eftir loknan skúladag. Frítíðarstovnar skulu sum minstamark, fevna um børn upp til og við 2. flokk. Kommunan kann tó víðka tilboðið til eldri flokkar, t.d. 3. ella 4. flokk, um hon metir tað vera neyðugt.

Dagrøkt er í § 3, stk. 2, nr. 4 lýst sum skipanarháttur, t.e. tilboð í heimi hjá dagrøktara ella í spælistovu. Dagrøkt sambært § 3, stk. 2, nr. 4 er fevnd av teimum almennu krøvunum í hesi lóg um trygd, eftirlit og námsfrøðiligt virksemi. Hetta tryggjar, at børn og foreldur hava sama grundarlag fyri trygd og dygd, eisini tá ið tilboð verður skipað sum dagrøkt.

Stk. 3.
Adursbýtið millum dagrøkt/vøggustovu og barnagarð vísir til, hvør vanlig praksis er í dag. Kommunurnar kunnu við hesi áseting víkja frá teimum markum, sum eru nevnd í § 3, stk. 2, tá talan er um menningarlig atlit hjá barninum, praktiskar ella skipanarligar orsakir. Í praksis kann talan vera um eina yvirgongd millum skipanir, so sum smábarnastovur ella tørvur er á, at eitt barn er longur í vøggustovu, fer fyrr í barnagarð o.s.fr.

Møguligt er hjá kommununi at víkja frá 10 mánaða markinum til vøggustovu ella dagrøkt, um serligar umstøður gera seg galdandi, so sum skúlagongd hjá foreldrum, sálarligar avbjóðingar, sjúka, sosialar umstøður o.a.

Stk. 4.
Umframt dagstovnatilboðini nevnd í § 3, stk. 2, kann kommunan eisini bjóða samansett tilboð.

Samansett tilboð kunnu vera fleiri ymisk dagstovnatilboð, ið støðugt verða veitt undir somu lon og leiðslu. Hetta gevur kommununum rásarúm at skipa tilboðini eftir lokalum viðurskiftum og *námsfrøðiligum tørvi*, og tað fevnir eisini um møguleikan at arbeiða eftir ymiskum námsfrøðiligum leistum, har bólkabýtið og daglig skipan kann verða tillagað – eisini tá ið bólkar ikki verða skipaðir eins og eitt fast "aldursbýti" í praksis.

Undantaksloyvi er tískil ikki hugsað sum ein sera trong "serlig støða", men sum ein møguleiki at tryggja, at kommunan kann seta ein annan skipanarhátt í verk, tá ið tað er grundað í fakligum metingum, tørvi hjá børnum og lokalum fortreytum – og tó framvegis innan karmarnar av, at tilboðið er greitt, trygt og skipað.

Til § 1 nr. 5.
Serligar viðmerkingar til § 3 a, stk. 1-2

Stk. 1.

Ásetur reglur um upplatingartíðir fyri dagstovnaøkið.
Dagrøktir, vøggustovur og barnagarðar hava opið gerandisdagar í dagtímunum, meðan frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag og kunnu hava opið í skúlafrítíðum. Gerandisdagur í hesum høpi er frá og við mánadag til og við fríggjadag.
Kommunan kann áseta nærri upplatingartíðir fyri hvønn einstakan dagstovn, soleiðis at til ber at tillaga stovnsvirksemi eftir eitt nú tørvi og lokalum umstøðum.
Ásetingin heimilar eisini kommununi at áseta nærri reglur um, hvussu frítíðarstovnar hava opið í skúlafrítíðum.

Stk. 2.
Ásetingin gevur kommuni heimild at avmarka upplatingartíðir heilt ella partvíst. Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, kunnu í mesta lagi hava stongt fimm vikur tilsamans um árið, íroknað tær fýra samanhangandi vikurnar frí. Umráðandi er tó, at kunning um slíkar avmarkingar verður latin foreldrum í góðari tíð, og gjarna minst seks vikur frammanundan, tá talan er um einkultar frídagar, so sum ráðleggingardagar. Kunning um samanhangandi frítíð harafturímóti, so sum jólafrítíð o.a. eigur at vera latin, tá dagstovnur letur upp eftir summarfrítíð.

Endamálið við ásetingini er at gera eitt felags hámark, hvussu nógvar vikur dagstovnar kunnu hava stongt, soleiðis at foreldur hava rímiligan tryggleika og frammanundan kunnu fáa greiða kunning. Kommunurnar hava í verki fakliga og fyrisitingarliga metingarrættin, og verða ikki væntaðar at leggja afturlatingardagar tilvildarliga.
Ásetingin skal tryggja skipaða frítíð og geva stovnum møguleika at leggja arbeiðsætlanir og nýta arbeiðsorku rímiliga, samstundis sum familjur og starvsfólk kunnu fyrireika sína frítíð. Kommunan eigur at ráðføra seg við foreldraráðið, áðrenn avgerð verður tikin um slíka afturlating, soleiðis at tryggjað verður, at foreldur verða hoyrd.

Í fleiri kommunum verður skipað fyri samanløgdum tilboðum tvørtur um stovnar, meðan stovnar hava stongt um summarið. Hetta er eisini ein møguleiki sambært hesi áseting og gevur kommunum rásarúm til at tryggja tilboð í tíðarskeiðum, har stovnar eru stongdir. Umráðandi er tó, at slíkar skipanir altíð verða lagdar til rættis við atliti at barnsins besta, soleiðis at børnini fáa tryggar og kendar karmar.

Talan kann eisini vera um tilboð, sum tíðaravmarkað ella vegna serligar umstøður, verðar veitt saman, t.d. tilboð, sum verða løgd saman undir somu lon í sambandi við frítíð, ella tilboð, sum vegna størri skaðar, umbygging ella nýbygging, mugu veitast aðrastaðni.

Serligar viðmerkingar til § 3 b, stk. 1-2.

Stk. 1.
Ásetingin ger greitt, at kommunurnar hava dagliga ábyrgd fyri øllum dagstovnaøkinum – fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga. Hetta merkir, at kommunurnar eru nærmasti myndugleiki fyri rakstri og innihald, og hava ábyrgd fyri, at virksemið verður rikið og ment í samsvari við lógina og faklig krøv.

Daglig *námsfrøðilig ábyrgd* merkir, at kommunan hevur fakliga ábyrgd av innihaldi og at menna námsfrøðiliga arbeiðið á stovnunum.
Hetta merkir, at kommunan leggur fakligt grundarlag fyri arbeiðinum, tryggjar fakligar karmar og eftirmeting, og hevur neyðugar skipanir, ið stuðla undir menning og dygd í samsvari við málini í lógini.

Kommunan skal hava førleika og skipan til at kunna fylgja við, men endaligu fakligu karmarnir verða ásettir á landsstigi, sjá stk. 2.

Daglig *fíggjarlig ábyrgd* merkir, at kommunan hevur ábyrgd av útreiðslum, rakstri og at fíggja dagstovnaøkið.
Hetta merkir, at kommunan leggur fíggjarligar karmar fyri økið, tryggjar, at teir samsvara við lógarfestar skyldur, og hevur eftirlit við, at raksturin er fíggjarliga burðardyggur.

Daglig *fíggjarlig ábyrgd* merkir, at kommunan hevur ábyrgd av útreiðslum, rakstri og at fíggja dagstovnaøkið.
Hetta merkir, at kommunan leggur fíggjarligar karmar fyri økið, tryggjar, at teir samsvara við lógarfestar skyldur, og hevur eftirlit við, at raksturin er fíggjarliga burðardyggur.

Sambært § 10 í lógini hava kommunurnar harumframt eftirlit við, at stovnarnir virka sambært hesum skyldum.
Tað undirstrikar samanhangin millum ábyrgd og eftirlit, har kommunan ikki bert rekur, men eisini tryggjar fakligt og fyrisitingarligt reglusemi innan teir karmar, sum lógin setur.

Kommunurnar kunnu skipa samstarv sínámillum fyri at loysa uppgávur á burðardyggan hátt, t.d. innan ráðgeving, umframt dygdar- og menningararbeiði. Slíkt samstarv skal tryggja javnbjóðis tænastur í øllum kommunum.
Við ásetingini verður ábyrgdarbýtið greitt: Kommunurnar hava rakstrarligu og fakligu ábyrgdina, meðan landsstýrisfólkið røkir ta yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina sambært stk. 2.

Stk. 2.
Ásetingin viðførir, at landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina av dagstovnaøkinum.

Hetta merkir, at landsstýrisfólkið skal tryggja felags fakligt grundarlag, samskipan og vegleiðing fyri menning á økinum, uttan at taka frá kommununum teirra dagligu fakligu og fyrisitingarligu ábyrgd.
Endamálið við ásetingini er at skapa ein felags og javnbjóðis karm um námsfrøðiligt virksemi og menning í øllum landinum, har kommunurnar arbeiða innan fyri felags fakligar karmar, men hava frælsi til lokalar tillagingar.

Yvirskipað námsfrøðilig ábyrgd fevnir um felags faklig stevnumið og vegleiðing á landsstigi. Landsstýrisfólkið kann røkja hesa ábyrgd gjøgnum undirliggjandi fakligan stovn, í dag Nám, sum miðlar vitan og samskipar arbeiðið á økinum. Stovnurin hevur leiðandi og samstarvandi leiklut í at savna vitan, miðla gransking og menna fakligt tilfar, sum kommunurnar kunnu brúka í síni menning og eftirmeting.
Endamálið er at skapa felags fakligt støði og samskipaða menning, ikki at leggja nýggjar skyldur á kommunurnar.

Ábyrgdin hjá landsstýrisfólkinum fevnir í høvuðsheitum um hesar fakligu uppgávur:

Yvirskipað námsfrøðilig vegleiðing

- at geva kommunum felags fakligar karmar, leiðreglur og metingaramboð til fakligt arbeiði,
- at miðla nýggjastu fakligu vitan og gransking á dagstovnaøkinum.

Felags standardar fyri góðsku
- at orða leiðreglur og fyrimyndir fyri góða námsfrøðiliga dygd á dagstovnum, m.a. innan spæl og læring, samskifti, málmenning, trivnað og sosialar førleikar,
- at tryggja, at hesir fakligu karmar verða brúktir sum felags grundarlag, men við rúmi til lokalar tillagingar.

Framleiða faklig tilfar og amboð
- at menna og miðla tilfar og vegleiðingar, grundað á gransking og royndir úr praksis,
- at stuðla undir kommunalt arbeiði og forða fyri tvíarbeiði.

Samanhangur millum dagstovnar og skúlar
- at menna leiðreglur og fakligt tilfar, sum tryggja greiða yvirgongd frá dagstovni til skúla,
- at fremja fakligan kontinuitet millum stovnar og skúlar.

Sum áður víst á, so hevur landsstýrisfólkið sambært § 10, stk. 2 yvirskipað eftirlit við, at kommunurnar røkja sínar lógarbundnu skyldur á dagstovnaøkinum. Ásetingin tryggjar, at yvirskipað ábyrgd og eftirlit fylgjast, t.e. at landsstýrisfólkið skal tryggja, at fakligu karmarnir eru greiðir, og at kommunurnar fáa neyðugan fakligan stuðul og vegleiðing til at røkja sítt virksemi sambært lógini.

Serligar viðmerkingar til § 3 c, stk. 1-3.

Stk. 1.
Við hesi áseting verður stovnaður ein formaliseraður samstarvspallur millum land og kommunur á dagstovnaøkinum. Endamálið er at tryggja felags fakliga kós, dygd og samskipan av arbeiðinum á økinum og at styrkja samanhang millum yvirskipaða námsfrøðiliga ábyrgd landsins og dagliga fakliga og fyrisitingarliga ábyrgd hjá kommunum. Bæði land og kommuna hava javnbjóðis møguleikar at ávirka felags arbeiði, og Samstarvsnevndin verður mannað við javnbjóðis tali av umboðum frá landinum og kommununum.

Stk. 2.
Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum at seta eitt fakligt Dagstovnaráð, sum skal veita Samstarvsnevndini fakliga ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at arbeiðið í Samstarvsnevndini verður grundað á eitt skipað og fakligt grundarlag, soleiðis at faklig menning, samskipan og ráðgeving á lands og kommunalum stigi verður framd við høgari námsfrøðiligari dygd og við støði í royndum, vitan og menningartørvi innan dagstovnaøkið.
Dagstovnaráðið er eitt ráðgevandi fakligt organ, og hevur ikki avgerðarmyndugleika.

Dagstovnaráðið skal kunna:

- gera fakligar metingar og tilmæli til Samstarvsnevndina,
- ráða til at seta royndar- og menningarvirksemi í verk, og
- viðvirka til at skapa samanhangandi og javnbjóðis fakligan menningarleist á dagstovnaøkinum.

Stk. 3.
Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur um manning, skipan, arbeiðsgongd og virksemi hjá ávikavist Samstarvsnevndini og Dagstovnaráðnum.
Nærri reglur vera ásettar í tøttum samstarvi við Kommunufelagið, fyri at tryggja, at báðir partar eru tiknir við í orðing av reglunum, og at arbeiðsskipanin er fakliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga rímilig.

Heimildin kann m.a. nýtast til at áseta reglur um:
- fundarskipan, arbeiðsætlan og arbeiðsbýti í nevndini/ráðnum,
- fakligar uppgávur, ábyrgdarbýti og arbeiðsøki hjá nevndini/ráðnum,
- mannagongdir fyri samskipan millum land og kommunur,
- upplýsingargongd og skjalagoymslu,
- samskipan á økjum, har dagstovnar og skúlar hava felags áhugamál, tó uttan at leggja skyldur á skúlaskipanina.

Heimildin fevnir tó ikki um at leggja nýggjar fíggjarligar ella umsitingarligar skyldur á kommunurnar uttan semju og fíggjarliga viðgerð.

Til § 1 nr. 6.
Serligar viðmerkingar til § 5 a, stk. 1-3.

Stk. 1.
Ásetingin staðfestir skyldu hjá kommununum at tryggja námsfrøðiliga ráðgeving. Hetta kann gerast umvegis kommununa sjálva, ella at hon ger tað í samstarvi við aðra kommunu, ella í triðja lagi, at henda ráðgeving verður keypt aðrastaðnis frá.

Námsfrøðilig ráðgeving er ein námsfrøðilig tænasta, sum hevur til endamáls at tryggja fakligar, inkluderandi og fyribyrgjandi tilgongdir á dagstovnaøkinum.
Ráðgevingin miðar í fyrstu syftu móti at lofta støðum hjá børnum, ið hava avbjóðingar í menning, sosialum felagsskapi, samskifti, trivnaði ella atferð, áðrenn tørvur er á sernámsfrøðiligum ella tvørfakligum tiltøkum.

Kommunal námsfrøðilig ráðgeving fevnir m.a. um:
- námsfrøðiliga vegleiðing til starvsfólk og leiðslur,
- eygleiðingar, reflekterandi arbeiðshættir og konsultativa tilgongd,
- meistaralæru, har ráðgevar arbeiða í felag við starvsfólkum,
- námsfrøðiliga fyribyrging og einstakar fyriskipanir til børn við avbjóðingum,
- menningarverkætlanir og skeiðsvirksemi, sum styrkja námsfrøðiligu dygdina,
- grundleggjandi einfald sernámsfrøðilig amboð.

Endamálið er at tryggja trivnað, menning og inklusjón í almennu dagstovnatilboðunum.

Stk. 2.
Ásetingin staðfestir, at fakfólkum við serútbúgving innan sálarfrøði, talilærarum, ergo- og fysioterapeutum, sernámsfrøði o.ø. verður veitt sernámsfrøðiliga ráðgeving.
Tænastan er grundað á tvørfakliga vitan og er ætlað børnum, har tørvur er á serligari viðgerð, útgreining, motoriskum ella málsligum stuðli, sosialum átøkum ella øðrum tiltøkum, sum liggja uttan fyri fakligu rammuna hjá námsfrøðiligu ráðgevingini.

Sernámsfrøðilig ráðgeving fevnir m.a. um:

- sálarfrøðiliga kanning ella viðgerð
- taliráðgeving ella tekn-til-talu-arbeiði
- ergo- ella fysioterapi
- motoriskar ella málsligar kanningar
- greiningar ella ávísingar til psykiatri ella serlig tilboð
- tvørfakliga servitan innan hoyrn, sjón o.a.

Stk. 3.
Í summum málum kann vera ein ávís umskaring millum námsfrøðiligu ráðgevingina og sernámsfrøðiligu ráðgevingina. Umráðandi er tí við greiðum markamótum, soleiðis at tað greitt framgongur, at sernámsfrøðiliga ráðgevingin frá landinum veitir neyðug átøk, sum krevja serliga tvørfakliga vitan, meðan námsfrøðilig ráðgeving hevur ábyrgd av námsfrøðiligum og inkluderandi tiltøkum.

Heimildin hjá landsstýrisfólkinum sambært stk. 3 kann nýtast til at áseta felags mannagongdir fyri málsgongd, samskipan, ábyrgdarbýti og upplýsingargongd millum kommunur og land, undir hesum møguligar ásetingar um, hvussu foreldur og onnur í foreldranna stað verða tikin við í tað einstaka málið.

Einhvør flytan av persónligum upplýsingum, skal til eina og hvørja tíð verða í samsvari við galdandi reglur á økinum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 19. februar 2026

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar 1 frá Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá AHR
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Felags Foreldraráðnum í Tórshavnar kommunu
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Ingun Vágsheyg Niclasen
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Javna
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Jógvan Philbrow

Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Katrin Bjarnadóttir
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Mariu Heradóttir
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar 2 frá Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Undirvísingarstýrinum
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Sernámi
Fylgiskjal 15: Hoyringarsvar frá Føroya Pedagogfelag
Fylgiskjal 16: Hoyringarsvar frá Mariu Johannesen
Fylgiskjal 17: Hoyringarsvar frá MEGD
Fylgiskjal 18: Hoyringarsvar frá Anju Clementsen
Fylgiskjal 19: Hoyringarsvar frá Námsfrøðiligu ráðgevingini í Tórshavnar kommunu
Fylgiskjal 20: Hoyringarsvar frá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum
Fylgiskjal 21: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum